# Uppkast
# til
# føroyska ætlan um burðardygga menning

## Ár 2002 - 2020




**Heilsufrøðiliga starvsstovan**
Mál nr.: 7-2000-00976-22
Verkætlan: Barbara Samuelsen
Dagfesting: 4. januar 2002

# Innihaldsyvirlit

**INNGANGUR** ........ **3**

**FRAMFERÐARHÁTTUR OG UPPBYGNAÐUR** ........ **6**

AVMARKING ........ 6
BYGNAÐUR ........ 7

**KAPITTUL 1** ........ **9**

HAVIÐ ........ 9

**KAPITTUL 2** ........ **15**

FERÐAVINNA ........ 15

**KAPITTUL 3** ........ **18**

ÍDNAÐUR, HANDIL OG TÆNASTUR ........ 18

**KAPITTUL 4** ........ **21**

ORKA ........ 21

**KAPITTUL 5** ........ **25**

BURTURKAST ........ 25

**KAPITTUL 6** ........ **28**

ALMEN LUTTØKA OG LOKAL AGENDA 21 ........ 28

**KAPITTUL 7** ........ **31**

UPPFYLGING ........ 31

# Inngangur

Skjótt 10 ár eru liðin síðan største ST-ráðstevnuna nakrantíð, ráðstevnan um umhvørvið og menning, var í Rio de Janeiro í 1992. Á breddanum vóru mál sum veðurlagsbroytingar, umsiting av náttúrutilfeinginum, nýtsla av kemiskum evnum, hungursneyð í triðja heiminum og vøkstur í fólkatalinum. Mál, sum bert kunnu loysast ígjøgnum altjóða samstarv. Tað, sum spurdist burtur úr ráðstevnuni, var m.a. Agenda 21 skjalið. Við Agenda 21 samdust tey 180 londini um, at arbeiðast mátti fyri at bøta um umsitingina av náttúrutilfeinginum og fyri at minka um støðugu dálkingina. Harafturat avgjørdu tey, at arbeiðast skuldi fyri, at tann fátæki parturin av heiminum skuldi fáa størri ágóðar av tilfeinginum.

Agenda 21 byggir á hugtakið um burðardygga menning, sum ber í sær, at náttúrunnar virðir verða umsitin soleiðis, at komandi ættarlið eisini kunna fáa ágóðan av teimum.

Hugtakið um burðardygga menning inniber, at miðast skal ímóti at loysa umhvørvisligar, búskaparligar og sosialar trupulleikar samstundis og í mun til hvønn annan. Hesi trý økini eiga at fella inn í hvørt annað, soleiðis at fyrilit fyri t.d. umhvørvinum verða tikin við, tá ið avgerðir innan onnur øki skulu takast. Arbeiðast skal fyri, at vit náa hægsta markið í vælferð, bæði fíggjarliga og sosialt, uttan at gera skaða á tilfeingið á jørðini. Soleiðis kunnu vit tryggja, at komandi ættarlið fáa møguleika at njóta ta somu vælferð, sum vit.

Í Agenda 21 skjalinum verður heitt á stjórnirnar í londunum um at gera ætlanir fyri eina burðardygga menning í 21. øld. T.v.s. gera ætlanir fyri, hvussu londini hvør í sær vilja gera sítt til at minka um dálkingina, veðurlagsbroytingarnar, verja ozonlagið, minka um tilfeingisnýtsluna o.s.fr. Í 2002 hittast londini aftur til eina uppfylging av Rio, hesuferð í Suður Afrika, og tá skulu tey leggja fram sínar ætlanir fyri burðardygga menning.

Eisini Føroyar skulu tá vera við til at leggja fram sínar ætlanir. Hetta uppskotið, sum nú fyriliggur, er eitt uppskot til føroyska íkastið til alheimsliga arbeiðið við burðardyggari menning.

Hetta at nýta náttúrutilfeingið á ein burðardyggan hátt er nakað, sum føroyingar kanska hava lættari við at skilja enn nógv onnur lond, av tí at vit byggja stóran part av okkara tilveru á at nýta tílíkt tilfeingið, men tað eru ymiskar meiningar um, hvussu hetta skal gerast.

Granskarar hava leingi víst á, at gongda leiðin, alheimsliga sæð, ikki er burðardygg. Okkara nýtsla og lívsstílur, sum heild, føra við sær, at náttúruríkidømið minkar, og áhaldandi dálkingin hevur álvarslig árin á okkara umhvørvi og heilsu. Hóast Føroyar hava eitt lutfalsliga reint hav og eina reina náttúru, hava vit, eins og flestir aðrir partar av vesturheiminum, eina stóra nýtslu.

Við hesi ætlan um burðardygga menning vilja Føroyar vísa, at vit eisini taka ábyrgd og vilja vera við til at verja um okkara náttúru og umhvørvi. Endamálið við eini føroyskari ætlan um burðardygga menning er tí m.a. at fyribyrgja, at fiskastovnar og annað tilfeingi verða overvað. Harafturat er endamálið við ætlanini at tryggja, at umhvørvið ikki verður dálkað soleiðis, at hetta kemur at hava skaðandi árin bæði á núverandi og komandi ættarlið.

Tann føroyska ætlanin um burðardygga menning hevur støði í Agenda 21 skjalinum. Harafturat hevur norðurlendska ætlanin ”En ny kurs for Norden” eisini verið nýtt sum grundarlag fyri menningina av føroysku ætlanini.

Føroyar hava ongantíð havt eina fullfíggjaða ætlan fyri umhvørvisøkið, og heldur ikki hevur nakar umhvørvispolitikkur verið orðaður. Mál fyri umhvørvisøkið hava verið løgd fram í lógum, kunngerðum, altjóða sáttmálum o.s.fr., og ábyrgdin fyri umhvørvisøkinum í breiðari merking er spjødd út á ymisk stýri. Umhvørvisverndarlógin, havumhvørvislógin, náttúrufriðingarlógin og aðrar smærri lógir eru ábyrgdarøkið hjá landsstýrismanninum í umhvørvismálum. Vernd av náttúrunnar tilfeingi annars er eisini spjatt út á ymisk stýri, sum hava ábyrgd av nýtsluni av hesum tilfeingi. Fiskimálastýrið hevur soleiðis ábyrgd av at umsita fiskastovnar og havsúgdjór, og Vinnumálastýrið hevur ábyrgd av veiðu, landbúnaði og aling. Landsstýrismaðurin í umhvørvismálum hevur ábyrgd av, at byggi- og býarskipanin er soleiðis háttað, at hædd er tikin fyri náttúru- og umhvørvisvernd.

Tað er greitt, at eitt yvirlit yvir umhvørvisøkið vantar, bæði tá talan er um dálking og dálkingarkeldur, og tá talan er um umsiting av náttúrutilfeinginum. Í Agenda 21 verður áherðsla løgd á at loysa umhvørvistrupulleikar út frá eini heildarmynd, har tætt samspæl er millum virksemið hjá menniskjum og “heilsuna” hjá náttúruni. Arbeiðast skal við fyribyrging, heldur enn upprudding tá skaðin er hendur.

Burðardygg menning kann tó, sum nevnt, ikki fremjast bert í einum landi. Hugsjónin um eina alheimsliga burðardygga menning er ein heimur við búskaparligari framgongd, størri vælferð og øktari umhvørvisvernd. Ein menning, har øll fáa sín part. Eisini tann veiki og fátæki parturin av heiminum. Hóast lítlar, eru Føroyar eitt ríkt land og eiga at gera sítt til at fremja eitt burðardygt alheimssamfelag.

Í Agenda 21 skjalinum verður áherðsla løgd á, at bert um allir bólkar í samfelagnum luttaka í arbeiðinum við burðardyggari menning, ber til at náa málinum um eitt burðardygt alheims samfelag. Tað er tí av stórum týdningi, at bæði vinnulív, kommunur, einstaklingar og feløg taka sína ábyrgd av arbeiðinum fyri at verja náttúruna og umhvørvið.

Vónandi kemur hetta uppskotið um eina føroyska ætlan um burðardygga menning at hava týdning, ikki einans fyri politikarar og embætisfólk, men eisini fyri aðrar partar av samfelagnum. Eitt ítøkiligt kjak um náttúru- og umhvørvisvernd, um møguleikar, mál og íløgur eigur at vera partur av eini fullgjørdari ætlan um burðardygga menning. Tess fleiri taka lut í tilgongdini og koma við viðmerkingum, tess betri úrslit náa vit fyri okkum sjálvi, og fyri komandi ættarlið.

# Framferðarháttur og bygnaður

## *Avmarking*

Síðani Brundtland-kommissiónin í 1987 við frágreiðingini “Vor Fælles fremtid” bar fram hugsjónina um at skapa eina burðardygga menning, hevur hugtakið vunnið frama í nógvum ymiskum høpum. Burðardygg menning er málsetningur á politisku dagsskránni hjá nógvum londum og altjóða felagskapum, sum t.d. ST, OECD, Norðurlanda Ráðharraráðnum og ES.

Agenda 21 skjalið hevur undirheitið *Ein dagsskrá fyri burðardygga menning.* Agenda 21 er ikki ein virkisætlan í vanligari merking, við lýsing av ítøkiligum gerðum, tíðarætlanum, stýringarskipanum o.s.fr. Agenda 21 eigur heldur at skiljast sum ein felags karmur, har landaligar og økisligar ætlanir kunna virka innanfyri.

Tað eru komnar fram nógvar ymiskar tulkingar av hugtakinum burðardygg menning, og nógv ymisk virði hava verið løgd í hugtakið. Hóast breið og opin, sýnist lýsingin hjá Brundtland-kommissiónini, har sagt verður, at burðardygg menning er *"en udvikling, som opfylder de nuværende generationers behov uden at bringe fremtidige generationers mulighed for at opfylde deres behov i fare”,* at vera tann mest útbreidda og nýtta.

Víðari verður sagt at*: ”Fundamentalt set er bæredygtig udvikling en ændringsproces, hvorunder udnyttelsen af ressourcerne, styringen af investeringerne, retningen for den teknologiske udvikling og ændringer i institutionerne alle er i balance med hinanden og øger både de nuværende og de fremtidige muligheder for at opfylde menneskehedens behov og forhåbninger."*

Hetta uppskotið til burðardygga menning í Føroyum hevur støði í lýsingini av hugtakinum burðardygg menning, sum Brundtland kommissiónin kom við í 1987. Føroyar eiga at taka undir við at fremja eina tjóðarætlan fyri burðardygga menning, sum setir fokus á komandi ættarlið og á verndina av náttúrugrundarlagnum. At arbeiða við burðardyggari menning inniber, at ávísir arbeiðshættir verða innførdir, sum taka hædd fyri umhvørvinum og náttúruni.

Sum nevnt í innganginum, fevnir hugtakið burðardygg menning um tríggjar dimensjónir; eina búskaparliga, eina sosiala og eina umhvørvisliga. Uppskotið til føroyska ætlan er gjørt út frá tí

málsetninginum, at búskapur og samfelag skulu kunna mennast til fulnar, uttan at hetta skal hava skaðilig árin á umhvørvið og náttúruna, men við fyriliti fyri bæði núverandi og komandi ættarliðum.

## *Bygnaður*

Uppskotið inniheldur eina lutfalsliga neyva lýsing av málum og tiltøkum, sum verða mett neyðug fyri einari føroyskari luttøku í fremjanini av burðardyggu menningini. Burðardygg menning nemur við mestsum alt virksemið í samfelagnum, men í ætlanini verður víst á sektorar og øki við serligum týdningi. Ætlanin setir fokus á fimm úrvald øki og vísir á, hvørji umhvørvisfyrilit eiga at verða tikin. Hesi øki eru havið, ferðavinna, vinnulív, orka, burturkast og almenn luttøka og Lokal Agenda 21, sum lýst í kap. 1-6.

Síðsta kapittlið snýr seg um, hvussu hetta uppskotið eigur at verða uppfylt. Har verður m.a. víst á tørvin at seta ein arbeiðsbólk, møguliga ein millumstýrisbólk, sum skal arbeiða við at gera málsetningarnar ítøkiligar fyri ymisku økini.

Í samsvari við altjóða rákið arbeiðir føroyska uppskotið út frá teimum fýra meginreglunum um, hvussu umhvørvisspurningar í framtíðini eiga at verða loystir. Hesar eru:

- Reglan um varni.
- Reglan um samskipan av umhvørvisfyrilitum við aðrar sektorar.
- Reglan um at tann, ið dálkar, rindar.
- Reglan um felags ábyrgd.

Uppskotið leggur eisini dent á at hugsa langt. Hetta er neyðugt, ikki bert fyri at skilja trupulleikarnar, men eisini fyri at kunna menna realistiskar strategiir og loysnir. Harafturat gevur langtíðarhugsan møguleika fyri at vera meira framsøkin, av tí at málið ikki skal røkkast frá einum degi til annan. Uppskotið mælir til at arbeiða við einari 18 ára tíðarætlan.

Tøk amboð til at seta í verk málsetningarnar um burðardygga menning eru ymisk. M.a. inniheldur ætlanin uppskot um nýtslu av búskaparligum stýringaramboðum, so sum grønar skattir og avgjøld. Harafturat er møguleiki at nýta umhvørvisstýring, grønar rokniskapir og sjálvbodnar avtalur.

Eitt týdningarmikið yvirskipað mál fyri ætlanina liggur í at útvega nýtarum, vinnulívi og almennum myndugleikum fortreytir fyri at kunna taka burðardyggar avgerðir. Búskaparlig stýriamboð kunnu saman við marknaðarkreftunum skapa hesa stimbran. Kunning og undirvísing eru tó av størsta týdningi fyri, at burðardyggar avgerðir verða tiknar – serliga tá hugsað verður um børn og ung.

Sum nevnt, verður í Agenda 21 skjalinum mælt til, at ætlanir um burðardygga menning innihalda tær tríggjar dimensiónirnar; ta sosialu, ta búskaparligu og ta umhvørvisligu. Í hesum uppskotinum hevur størsti denturin tó verið lagdur á tann umhvørvisliga partin.

Av tí at hagtøl og dokumentatión annars vantar á fleiri økjum, liggur ein stór uppgáva í at útvega hesar upplýsingar. Hendan vitan eigur at liggja sum grundarlag, tá ítøkiligir málsetningar skulu orðast, og er setningurin at útvega hetta tilfar tí ein týdningarmikil liður í ætlanini fyri burðardygga menning. Upprunaliga var ætlanin, at uppskotið eisini skuldi viðgera nøkur tvørgangandi øki, so sum veðurlagsbroytingar og lívfrøðiligt margfeldi, men grundað á manglandi hagtøl var henda ætlan slept. Av hesi somu orsøk kann sigast, at ein veikleiki í uppskotinum er, at orðaðu málsetningarnir fyri ein stóran part skulu fatast sum almenn og yvirskipað mál í mun til burðardygga menning.

# Kapittul 1

## *Havið*

**Heimsins høv eru ein týdningarmikil liður í alheimsligu vistskipanini. Umleið 80% av dálkingini av høvunum koma frá keldum av landi. Dálking kemur eisini frá skipaferðslu og dumping v.m.**

**Havið kring Føroyar verður roknað ímillum tey reinastu í heimunum, og Føroyar skulu gera sítt til, at hetta heldur fram. Útlát av skaðiligum evnum í havið, frá skipum og frá landi, eiga at halda uppat sum skjótast, ikki minst útlát av seintniðurbrótandi og eitrandi lívrunnum evnum og tungmetalum. Føroyar eiga eisini at luttaka í millumtjóða arbeiðinum, sum verður gjørt fyri at steðga dálking av havinum.**

**Høvuðsvinna føroyinga, fiskivinnan, er í stóran mun treytað av, at fiskastovnarnir fáa frið at virka sum endurnýggjandi náttúrutilfeingi. Burðardygg fiskivinna í einum reinum havi er ein fyritreyt fyri at varðveita fiskastovnarnar og vistskipanina í havinum, og harvið eisini ein treyt fyri menning av vinnuni í framtíðini.**

### 1.1 Fiskivinnan

Fram til miðskeiðis í sjeytiárunum kundu føroyingar frítt troyta at kalla allar leiðir í Norðurhøvum uttan nakrar serligar avmarkingar fyri, hvussu fiskiskapur kundi fara fram.

Í kjalarvørrinum av stóru tøkniligu og búskaparligu framgongdini í árunum eftir seinna heimsbardaga vórðu íløgur gjørdar í framkomin fiskiskip at troyta fiskiríkidømið, ið lá at kalla opið fyri øllum.

Sum frá leið gjørdist tó greitt, at fríi fiskiskapurin førdi við sær ovurfisking, og nógvir stovnar minkaðu. Alsamt fleiri lond ásannaðu, at neyðugt var at avmarka fiskiskapin. Síðani seinna heimsbardaga hevur gongdin verið, at møguleikarnir fyri frítt at troyta grunnarnar støðugt eru skerdir. Fiskimørkini eru flutt út, og meginparturin av fiskileiðunum eru komin undir yvirvaldsrætt hjá strandarlondum. Millumlanda fiskiveiði-felagsskapir, so sum NEAFC[1] og NAFO[2], stýra fiskiskapinum í altjóða sjógvi.

Megingrundarlagið undir fiskiskapinum hjá føroyskum skipum á føroysku landleiðunum er ymisk sløg av botnfiski, umframt uppsjóvar fiskastovnar, sum Føroyar eiga strandarlanda-rætt í.

[1] North-East Atlantic Fisheries Commission
[2] North-West Atlantic Fisheries Organization

Høvuðsamboðið í stýringini av botnfiskaveiðini er í dag fiskidagaskipanin saman við loyvisskipanini og økisfriðingum.

Umleið helvtin av tí, ið verður veitt og virkað, verður útflutt. Tí hava viðurskiftini í millumtjóða handli og politiska og búskapaliga støðan í keyparalondunum eisini týdning fyri úrtøkuna hjá vinnuni.

Fyri Føroyar sum matvøruframleiðandi land er neyðugt at gera sær greitt, at samantvinningin av marknaðarkrøvum til matvørur, umhvørvisvernd og umsiting av tilfeinginum í havinum fer at styrkjast í tíðini, sum kemur.

Hetta inniber m.a., at marknaðir fara at seta krøv um, at fiskurin verður veiddur við umhvørvisvinarligari tøkni, at stovnanir verða burðardygt umsitnir, og at vøran ikki er dálkað.

Størst møgulig vitan um ávirkan av fiskiskapi, umframt vitan um onnur árin á tilfeingi í havinum, er avgerandi fyri at kunna tryggja eina burðardygga umsiting av havinum  - og harvið tryggja eina nøktandi og heilsugóða matvøru.

Vantandi hagtøl og skjalprógv annars um tilfeingisgrundarlagið og havumhvørvið ger, at varliga má farast fram í umsitingini av tilfeinginum. Samsvarandi altjóða avtalum skal støðið undir umsitingini av fiskatilfeinginum tí verða meginreglan um fyrivarni.

Reglan um fyrivarni er allýst í grein 6 í ST-avtaluni frá 10. desember 1982, um varðveiting og umsiting av ferðandi fiskastovnum. Avtalan er staðfest á Føroya løgtingi 28. apríl 2000. Grein 6 ásetur, at fyrivarnismeginreglan skal nýtast í breiðum høpi, til tess at tryggja livandi tilfeingi í havinum, og at trot á haldgóðum vísindaligum upplýsingum ikki skal nýtast sum grundgeving fyri at lata vera við at fara undir varðveitingar- og umsitingartiltøk.

Vinnan sjálv og almennir granskingarstovnar eiga í felag at samstarva um at menna framleiðslu og veiðitøkni soleiðis, at mest møguligt fæst burtur úr tilfeinginum, við minst møguligum skaðiligum árinum á umhvørvið.

Ein av størstu avbjóðingunum hjá føroyskari fiskivinnu í hesum sambandi er at vaksa um virðisøkingina, t.v.s. at fáa meiri burturúr somu nøgd. Granskingin eigur tí m.a. at styrkja um hendan partin.

## 1.2 Aling

Aling er ein týdningarmikil sektorur í Føroyum og stendur fyri yvir ¼ av

útflutninginum. Men aling kann eisini hava við sær dálking.

Um árinini á aliøkini verða ov stór, kan hetta hava við sær, at fiskurin ikki trívist, veksur minni og verður minni mótstøðuførur ímóti sjúkum. Er fiskasjúka staðfest, eru nýggir vandar fyri umhvørvi:  spjaðing av sjúku, økt nýtsla og spjaðing av heilivági. Heilivágur og lúsaviðgerð, eiga at vera so umhvørvisvinarlig sum gjørligt.

Tað er tí av alstórum týdningi at avmarka dálkingina mest møguligt. Harafturat eigur alivirksemið ikki at hótta vistfrøðiliga, fjøltáttaða djóra- og plantulívið á firðunum.

Fyri at avmarka lokalu dálkingina mest møguligt eigur alingin so vítt gjørligt at fara fram á streymasjógvi, har vatnútskiftingin er góð.

Um aling er inni á firðunum, verður mælt til at nýta sokallaðar “lift-up” skipanir fyri at minka um botnfall. Eisini er vert at hava í huga, at koparið í impregneraðu nótunum kann hava skaðilig árin á umhvørvið.

Sum í fiskivinnuni á havinum, er eisini í alivinnuni neyðugt at gera sær greitt, at samantvinningin av marknaðarkrøvum til matvørur, umhvørvisvernd og umsiting av tilfeinginum fer at styrkjast. Alivinnan eigur tí at hava í huga, at marknaðurin kemur at leggja dent á, at fiskurin er aldur á reinum økjum og við umhvørvisvinarligari tøkni, umframt at fiskurin ikki inniheldur evni, ið kunnu virka eitrandi.

Eisini tá tað kemur til aling eiga Føroyar tí at taka lut í millumtjóða samstarvi at menna eitt umhvørvismerki, ið borgar fyri góðsku og umhvørvisvernd.

## Havsúgdjór 1.3

Veiða av grindahvali hevur eina langa siðvenju í Føroyum og er framvegis eitt týdningarmikið íkast til føroysk húsarhald. Føroyar eiga at gera sítt til, at veiðan av grindahvali og øðrum súgdjórum fer fram á ein burðardyggan hátt og byggir á vísindaligt grundarlag. Herundir kemur eisini, at arbeiðast skal fyri at betra um veiðu- og drápshættir - bæði við atliti at trygd og djóravernd.

Føroyar eiga at taka undir við grundregluni um, at havsúgdjór verða gagnnýtt soleiðis, at hetta ikki minkar um møguleikan hjá stovninum at fylla út sítt virki í vistfrøðiligu skipanini.

Altjóða samstarv er her av alstórum týdningi, og eiga Føroyar at virka fyri viðurkenning,

uppbygging og styrkjan av formligum, politiskum og vísindaligum kørmum fyri samstarvi.

Føroysk luttøka í millumtjóða samstarvi um hvalaveiðu fer í dag fram í NAMMCO[3] og IWC[4].

NAMMCO varð stovnað í 1992 við eini semju millum Noreg, Ísland, Føroyar og Grønland. Endamálið er samskifti og samstarv um umsiting og gransking í sambandi við havsúgdjór í Norðuratlants-havinum.

Limaskapur Føroya í NAMMCO gevur Føroyum góðan karm fyri at lúka krøvini í ST havrættarsáttmálanum, har ásett er, at lond skulu samstarva gjøgnum hóskandi millumtjóða felagsskapir um umsiting av hvalastovnum.

Føroyar eiga at stuðla gransking á økinum soleiðis, at vitanargrundarlagið um havið og tilfeingið í havinum verður økt. Í umsitingini av havsúgdjórum eigur meginreglan um varni at vera nýtt.

Nýtslan av havsúgdjórum sum tileingi er tíverri nógv hótt av dálking. Serliga er tað tungmetal og seintniðurbrótandi lívrunnin evni sum hópa seg upp í føðikeduni og sum ger tað neyðugt at verða ansin við nýtsluni av hesum tilfangi.

## 1.4 Vernd av havinum

Sum kunnugt, hevur havið ein ómetaligan týdning fyri Føroyar. Ikki bert gjøgnum fiskivinnu, aling og ferðslu - havið og strendurnar hava eisini ein stóran týdning sum frítíðar- og heilsubøtandi øki. Sum partur av grundarlagnum fyri burðardygga menning má vernd og nýtsla av tilfeinginum í havinum fylgjast.

Sum nevnt stava umleið 80% av dálkingini av havinum frá dálkingarkeldum á landi.
Tær størstu dálkingarkeldurnar eru húsarhaldsspillvatn, ídnaður og landbúnaður.

Vaksandi dálkingin av havinum hóttir havumhvørvið á ymsan hátt. M.a. tá talan er um dálkaðar matvørur úr havinum, og tá hugsað verður um sentrala leiklutin, havið hevur.

Í Norðuratlantshavinum eru størstu trupulleikarnir fyri havumhvørvið kjarnorkudálking, dálking við tungmetalum og dálking við seintniðurbrótandi lívrunnum evnum (POP's).

[3] The North Atlantic Marine Mammal Commission

[4] International Whaling Commission

Ein tann største avbjóðingunum fyri Føroyar í hesum sambandi er at kortleggja dálkingarkeldurnar, fyri síðani at gera av hvussu dálkingin kann avmarkast ella heilt steðgast.

Í Norðurlendsku ætlanini fyri burðardygga menning er málið, at í 2020 skal útleiðingin av vandamiklum evnum (samtakandi og seint niðurbrótandi evnir og tungmetal) verða steðgað[5].

Eisini í Føroyum skal útlát av slíkum evnum steðgast. T.d. við at seta harðari krøv til útleiðingar av spillvatni, bæði kommunalt og frá ídnaði. Spillvatnsreinsing eigur at verða framd, har sum vandi er fyri, at umhvørvið annars verður dálkað.

Hóast størsti parturin av dálkingini í havumhvørvinum stavar frá keldum á landi, er eisini neyðugt at minnast til, at ein partur av dálkingini stavar frá burturkasti frá skipum, sum verður tveitt á sjógv. Hendan útblakan eigur at steðgast, og avhendingarskipanir á landi eiga at útbyggjast.

---

[5] *En ny kurs forNorden,* TemaNord 2001, s. 40

**Yvirskipaðir málsetningar fyri umsiting og vernd av havinum:**

- Varðveita burðardygga vistskipan í havinum og á firðunum.
- Steðga útlátum av skaðiligum evnum í havið.
- Gagnnýta tilfeingið í havinum betri.

**Málsetningar:**

- Gransking og innsavnan av dáta skal stuðlast.
- Umhvørvisvinarligur veiðireiðskapur skal mennast, bæði í mun til botn og hjáveiðu.
- Mest møguligt av veiðuni eigur at verða gagnnýtt.
- Avhendingarskipanir fyri skip skulu betrast til tess at fyribyrgja, at burturkast verður tveitt fyri borð.
- Dálkingarkeldur á landi skulu kortleggjast, serliga hvat viðvíkur POP’s og tungmetalum.
- Spillvatn skal ikki innihalda umhvørvisfremmand evni.
- Umhvørvisstýring innførast í fiski- og alivinnuna.
- Kunning um umhvørvisvinarliga vørunýtslu, t.d. minni dálkandi vaskievnir og keyp av vistfrøðiligum matvørum.

# Kapittul 2

## *Ferðavinna*

**Føroyar eiga at arbeiða fyri eini ferðavinnu, sum er í javnvág við náttúruna, og sum bjóðar ferðafólki veruligar náttúru- og mentanarupplivingar. Harafturat skal ferðavinnan skapa arbeiði og inntøkur til samfelagið og fjøltátta vinnulívið soleiðis, at Føroyar fáa eitt breiðari vinnuligt grundarlag at byggja á. Rekreativu møguleikarnir hjá bæði fremmandum ferðafólki og føroyingum skulu tryggjast og betrast, m.a. við at verja náttúru- og mentanarvirði, samstundis sum at atgongdin til hesi virði verður tryggjað.**

**Búskaparliga framgongdin seinastu árini hevur í alheimsligum høpi havt við sær, at fólk ferðast nógv meira enn áður, bæði í arbeiðsørindum og sum ferðafólk. Hetta førir við sær trupulleikar í mun til alheimsligu burðardyggu menningina, bæði grundað á ta øktu flogferðsluna og grundað á tey negativu árini, ið ofta standast av ferðavinnu.**

Ferðavinnan var ikki upprunaliga við í Agenda 21 skjalinum, men kom við fimm ár seinni á UNGASS-ráðstevnuni í New York í 1997. Ein av grundunum til, at ferðavinnan tá varð tikin við sum serstakt øki, er, at ferðavinnan er blivin ein av størstu vinnunum í heiminum, umframt at grundarlagið fyri vaksandi ferðavinnu júst er náttúru- og mentanarvirði. Ferðafólk verða drigin av reinari og veruligari náttúru, og er hetta ein mangulvøra í nógvum londum.

Ferðavinnan er sum so eingin sjálvstøðug vinna. Heldur er hon ein samanseting av nógvum ymiskum vinnum í landinum, sum hava sum høvuðsendamál ella sum síðumál at veita ferðafólki eina vøru ella eina tænastu.

Ferðavinnan í Føroyum er enn ein lítil vinna, hóast í vøkstri. Landið er sera lítið og tí eisini viðbrekið. Vit eiga at vera væl fyrireikað til eitt økt ferðafólkatal, m.a. við at skipa eina ferðavinnu, sum er í sátt við bæði náttúru og fólk.

Hetta eigur at verða gjørt m.a. við at tryggja samstarv og samskipan av lokalplássunum og við at gera eina felags virkisætlan fyri eina burðardygga menning av ferðavinnuni.
Tað er av stórum týdningi, at samstarv er ímillum lendisskipanir í kommununum og útbyggingarætlanirnar hjá landinum.

Í hesum liggur eisini, at fólkið úti á plássunum og møgulig áhugafeløg verða tikin við í planlegging og menning av vinnuni, soleiðis at lokala mentanin verður styrkt og verður sjónligari.

Ein økt ferðavinna hevur ofta við sær slit á náttúru og umhvørvi og krevur tí størri umhvørvisvernd. Harafturat hava ferðafólk eina størri nýtslu, ið hevur við sær størri burturkastnøgdir og størri tilfeingisnýtslu.

Grundað á tey vaksandi umhvørvisárinini, hevur tey seinastu árini verið kjakast um eina skipan til at meta um burðardygga ferðavinnu.

Í hesum sambandi hevur Danmark ment eina merkiskipan, Destination 21, sum hevur til endamáls at sertifisera lokaløki við burðardyggari ferðavinnu. Javnvág skal vera millum ferðavinnuna á aðrari síðuni og umhvørvið og lokalíbúgvarnar á hinari.
Vit eiga m.a. at hugsa um, hvussu vit kunnu minka um tilfeingisnýtsluna og um dálkingina. Okkara rávøra er jú náttúran, og størsti áhugin hjá flestu ferðafólkunum er at kunna njóta eina reina og óspilta náttúru.

Við einari burðardyggari menning av ferðavinnuni verður arbeiði til fleiri hendur, eisini úti á smáplássunum, samstundis sum at Føroyar fáa støðu sum náttúruríkt øki.

Umframt at betra um umstøðurnar hjá ferðafólki yvirhøvur, eiga vit eisini at skapa betri umstøður fyri rørslutarnað. Hetta við at betra um atgongdina til rekreativu- og náttúru økini.

**Yvirskipað mál fyri eina burðardygga ferðavinnu:**

- Menna ferðavinnu, sum er í javnvág við náttúruna.
- Betra um rekreativu møguleikarnar.
- Tryggja vernd av náttúru- og mentanarvirðum.

**Málsetningar:**

- Skapast skulu karmar fyri eina burðardygga ferðavinnu.
- Fólk á staðnum eiga at taka lut í planlegging.
- Destinatión 21 ella líknandi eigur at verða ment í Føroyum.
- Betrast skal um rekreativu møguleikarnar til brekað og eldri.
- Gøtur v.m. skulu merkjast.
- Umhvørviskrøv skulu setast til ferðamannaskip, sum koma til føroyskar havnir.
- Ferðafólk eiga at verða kunnað um, hvussu ferðast skal í náttúruni, t.d. í sambandi við burturkast.
- Kommunur eiga í býar- og byggisamtyktum at planleggja eina ferðavinnu, sum er í sátt við náttúruna.

# Kapittul 3

## *Ídnaður, handil og tænastur*

**Ídnaður, handil og tænastur hava ein serstakan leiklut í arbeiðinum fram ímóti burðardyggari menning. Um framleiðsla og nýtsla skulu halda fram í einum framhaldandi búskaparligum vøkstri, er neyðugt at minka munandi um tilfeingisnýtsluna og árinini á umhvørvi og heilsu. Hetta kann bert gerast við at hava umhvørvisfyrilit við í øllum liðum av gongdini, frá framleiðslu til nýtslu og burturbeining.**

Av tí at ídnaður, handil og tænastur fevna um nógv ymisk sløg av vinnugreinum, er tað torført at geva eina samlaða mynd av teimum trupulleikum og avbjóðingum, sum standa fyri framman.

Tó eru tvey eyðkenni, sum eru grundleggjandi:

- Tilfeingisnýtsla.
- Umhvørvisárin frá vørum, heilt frá framleiðslu til nýtslu og til burturbeining.

Myndugleikar, vinnan og brúkarin eiga at samstarva um at fremja marknaðir, har umhvørvisfyrilit eru týdningarmikil, bæði í kappingini ímillum virkini og í okkara nýtslu av vørum og tænastum.

Myndugleikarnir eiga at gera leiðreglur, nýta skattir og avgjøld og innføra ”grønt skrivstovuhald” til frama fyri umhvørvisvinarligar vørur og tænastur, soleiðis at brúkarin og vinnulívið sjálvt kann taka ábyrgd av at nýta tilfeingið effektivari og minka um nýtsluna av skaðiligum evnum.

Í kapittul 29 í Agenda 21 skjalinum verður víst á, at umhvørvisstýring á virkjum eigur at fáa hægstu raðfesting, tí tað er har, at lykilin til broytingar til burðardyggar mannagongdir er at finna.

Eitt eyðkenni fyri umhvørvistrupulleikarnar í hesi nýggju øldini er, at teir fyri ein stóran part eru vorðnir ósjónligir í okkara gerandisdegi. $CO_2$-útlát, upphiting av klótini, eitt tynri ozonlag og økjandi nýtsla av kemiskum evnum merkja vit ikki á sama hátt sum skitnar áir og svartan skorteinsroyk.

Við at undirskriva Agenda 21 skjalið hava ídnaðarlondini moralskt bundið seg til at arbeiða fyri einum burðardyggum samfelag, og tað inniber, at denturin tey komandi árini eigur at verða lagdur á at effektivisera

tilfeingisnýtsluna, umframt framhaldandi at minka um negativu árinini á umhvørvið.

Hóast føroyska vinnulívið fyri ein stóran part er samansett av smáum fyritøkum, sum undir framleiðsluni ikki dálka á sama hátt sum tungi ídnaðurin í grannalondunum, so eiga vit í framtíðini eisini at taka ábyrgd fyri tí virksemi, sum fer fram her á landi.

Vit nýta tilfeingi til framleiðsluna - tilfeingi, sum ofta verður flutt ein langan tein, áðrenn tað kemur á framleiðslustaðið. Haraftrat verður vøra og møguligt pakkitilfar einaferð burturkast, og tá er tað týdningarmikið at avmarka tilfeingisnýtsluna, harnæst at burturbeiningin dálkar minst møguligt, ella enn betur, at tilfarið kann endurnýtast. Eisini er vert at hugsa um orkunýtslu, sum í flestu førum bæði er dálkandi og tilfeingistærandi.

Landið eigur við skattum og avgjøldum at stýra nýtsluni og gera skipanir eftir meginregluni um, at tann, ið dálkar, rindar.

Eisini eigur landið at føra eina miðvísa kunning til brúkaran um umhvørvisviðurskiftini í sambandi við vørur og tænastur. M.a. kunna brúkarar um umhvørvismerktar vørur.

Norðurlendska Ráðharraráðið stovnaði fyri 10 árum síðani eitt umhvørvismerki, ið nevnist *Svanin*. Endamálið við merkinum er at geva brúkarum ein møguleika at velja vørur við umhvørvisvinarligum eginleikum. Eitt annað viðurkent merki er evropeiska *Blóman*, sum er eitt umhvørvismerki undir ES.

Eisini handils- og tænastuvinnan í Føroyum eiga at geva umhvørvinum meira ans. Sum dømi eiga innflytarar av vørum at leggja størri dent á umhvørvismerktar vørur og annars sum heild hugsa umhvørvisvinarligt.

Land og kommunur eiga at innføra grønan innkeypspolitikk. Hetta vil stuðla uppundir eftirspurningin av umhvørvismerktum vørum, tí at kommunur og land hava eina sera stóra nýtslu. Øll norðurlond hava tikið stig til ein grønan politikk á hesum øki, og Føroyar eiga eisini at fáa gongd á hetta arbeiði.

**Yvirskipað mál fyri vinnulív, handil og tænastur:**

- Minka um tilfeingisnýtsluna.
- Minka um framleiðsluútlát.
- Minka um umhvørvisárin frá nýtslu og burturbeining.

**Málsetningar:**

- Brúkarar eiga at verða kunnaðir um umhvørvismerkini, Svanan og Blómuna.
- Innførast skal grønt skrivstovuhald á almennum/kommunalum skrivstovum/stovnum.
- Avgjøld skal leggjast á dálkandi vørur.
- Kemikaliulóggáva skal gerast.
- Virkir eiga at verða stuðlað og eggjað til at innføra umhvørvisstýring.
- Grønir skattir eiga at verða innførdir.
- Føroysk framleiðsla skal stimbrast.

# Kapittul 4

## *Orka*

**Orkunýtsla og orkuframleiðsla eru týdningarmikil íløguøki fyri burðardyggu menningina. Í fyrsta lagi grundað á ta dálkingina, ið stendst av nýtsluni av fossilum brennievnum, so sum olju og kol, og í øðrum lagi grundað á ta sannroynd, at hesar orkukeldurnar ikki eru varandi.**

**Fleiri dálkingartrupulleikar standast av nýtslu av fossilu brennievnun. Eitt er, at stórar mongdir av $CO_2$ verða útleiddar. Sambært týðandi granskarum elvir henda sokallaða vakstrarhúsgassin til veðurlagsbroytingar, av tí at miðalhitin á jørðini so smátt økist. Annað er útleiðing av $SO_2$ og $NO_X$ gassum, sum, tá tey koma í samband við vætu í luftini, gerast til ávíkavist svávul- og salpetersýru, sum hava súrandi árin á jørðina og alt, sum á henni finst.**

**Føroyar hava ikki sett sær mál fyri, hvussu nógv útlátið av vakstrarhúsgassum skal minka innan eitt ávíst áramál, men hetta eigur at verða gjørt, júst sum í grannalondun okkara. Nøgdin av útlátum skal minka, m.a. við at minka um samlaðu orkunýtsluna, betra um orkueffektivitetin og økja um nýtsluna av varandi orkukeldum. Haraftrat er neyðugt at avmarka nøgdirnar av $SO_2$ og $NO_x$-útlátum, m.a. við at nýta reinari brennievni og við betri reinsing av roykinum frá orkuframleiðslu.**

Nútíðar ídnaðarsamfelagið er púra bundið at framhaldandi nýtslu av orku. Nýtslan av orku í Evropa stavar fyrst og fremst frá ikki varandi orkukeldum, størsti parturin, umleið 90%, frá fossilum orkukeldunum - olju, koli og natúrgassi. Tey eftirverandi umleið 10% stava frá vatn- og kjarnorku.

Orkunýtslan í Norðurlondum er lutfalsliga høg, umleið 20% hægri fyri hvønn íbúgva enn í hinum OECD-londunum. Hetta kemst av landafrøðiligu støðuni, lága fólkatættleikanum og einum orkukrevjandi ídnaði.

Avbjóðingar á orkuøkinum eru m.a. at steðga veðurlagsbroytingunum og súrum regni. Hesir trupulleikar flyta seg um landamørk, og er tað tí neyðugt við millumtjóða samstarvi, sum Føroyar eisini eiga at taka lut í.

### 4.1 Súrt regn

Fyri nøkrum ártíggjum síðani vóru útlát av $SO_2$ og $NO_x$ fatað sum einans ein heilsutrupulleiki, ið kundi loysast við at byggja hægri skorsteinar. Síðani varð gjørt vart við, at luftdálking við $SO_2$ og $NO_x$ elvir til súrt regn. Avleiðingarnar av hesum súra regni eru m.a. skógardeyði og oyðileggjan av vistskipanini í vatnøkjum.

$SO_2$ og $NO_x$ útlát eru sum nevnt úrslit av brenningini av fossilumbrennievnum. Størstu útlátini í Føroyum stava frá skipaferðslu,

upphiting av húsum , flutningi og el-framleiðslu. Føroyar eiga eins og grannalond okkara at leggja seg eftir at minka um útlátini av $SO_2$ og $NO_x$.

Effektivisering av orkunýtsluni, nútímans útgerð, betri brenning og betri reinsing av roykinum frá ídnaði, ravmagnsverkum og brennistøðum kann vera ein háttur at minka um trupulleikan. Eisini er týdningarmikið, at oljan, ið verður nýtt, er so rein sum gjørligt. Tað vil millum annað siga, at svávulinnihaldið ikki er ov høgt.

Markvirði fyri útlát av $SO_2$ og $NO_x$ eiga at verða sett m.a. el-framleiðarum, ídnaði, skipum og bilum.

Besta loysnin er tó at minka um brenningina av fossilum brennievnum, m.a. við at nýta aðrar orkukeldur. Føroyar eiga at stuðla uppundir umskifti til nýtslu av varandi orkukeldum, m.a. við menning og gransking.

## 4.2 Veðurlagsbroytingar

Trupulleikin við við teimum møguliga menniskjaskaptu veðurlagsbroytingunum eigur at verða tikin í størsta álvara.

Veðurlagspallborðið hjá ST er komið til ta niðurstøðu, at bert um ídnaðarlondini minka um $CO_2$ útlátið við 30% í mun til støðið í 1990, slepst undan álvarsligum veðurlags-broytingum. Í Kyoto-avtaluni frá 1997 varð avgjørt, at ES-londini samlað frá 2008 til 2012 skulu minka um útlátini av vakstrarhúsgassum við 8%.

Føroyar eiga sjálvsagt at taka lut í hesum arbeiðinum. Ein grundleggjandi partur av uppgávuni í Føroyum liggur í at útvega hagtøl, soleiðis at ítøkilig mál kunnu setast um, hvussu útlátið skal minka.

Amboðini eru ymisk til tess at minka um útlát av vakstrarhúsgassum. Munandi orkusparing innan øll øki er neyðug. Eisini eigur orkueffktiviteturin at betrast, m.a. við útbygging av verandi fjarhitaneti soleiðis, at so nógv avlopsorka sum gjørligt verður nýtt.

Samstundis eiga Føroyar, sum áður nevnt, at vaksa um nýtsluna av varandi orkukeldum. Sambært frágreiðingina *En ny kurs for Norden,* TemaNord 2001, s. 65, eru Føroyar eitt av teimum norðurlondum, ið hevur minsta partin av varandi orkukeldum í mun til bruttoorkunýtsluna (TPES[6]), umleið 3%[7] í 1997.

Til samanberingar kann nevnast, at Noreg nýtur 44%, Danmark 8% og Svøríki 28% av varandi orkukeldum í mun til bruttoorku-nýtsluna.

[6] Total Primary Energy Supply
[7] *En ny kurs forNorden,* TemaNord 2001, s. 65.

Nýtslan av varandi orkukeldum í Føroyum kann m.a. økjast við at nýta vindorku, alduorku ella biomassa. Fyrsta stigið er tó at gera eina kortlegging av samlaðu orkunýtsluni og at kanna møguleikarnar fyri nýtslu av alternativum orkukeldum. Eisini eiga vit at stuðla granskingarverkætlanum til tess at menna røttu loysnina fyri Føroyar.

**Yvirskipað mál fyri orkuøkið:**

- Menna varandi orkukeldur.
- Minka um orkunýtsluna.
- Minka um útlát av vakstrarhúsgassum.
- Minka útlát av NOx og SO2.
- Betra um orkueffektivitetin.

**Lutmál:**

- Útvega hagtøl soleiðis, at ítøkilig mál kunnu orðast.
- Verandi orkuskipanir eiga at nútímansgerast fyri at effektivisera og nýta avlopshita.
- Tað almenna eigur at ganga á odda við orkusparing, m.a. við at nýta orku- og umhvørvisstýring í almenna sektorinum.
- Almenningurin skal kunnast um umhvørvis- og orkumerktar vørur.
- Menning av varandi orkukeldum skal fremjast.
- Krøv skulu setast til skipaferðslu og el-framleiðarar um CO2, SO2 og NOx -útlát.
- Avgjald eigur at verða lagt á olju við høgum svávulinnihaldi.
- Almenningurin skal upplýsast meira um orkusparingar.
- Hitaorkan frá brennistøðunum skal í størri mun nýtast.
- Vinnulívið eigur at stuðla gransking og royndum við varandi orkukeldum.
- Vinnulívið eigur í størri mun at nýta umhvørvisvinarligar orkukeldur.
- Vinnulívið eigur at nýta umhvørvisstýring / orkustýring á virkjum.

# Kapittul 5

## *Burturkast*

**Aðalmálið fyri burturkastøkið er fyrst og fremst at minka um burturkastnøgdirnar. Harafturat eiga vit at endurnýta og endurvinna so nógv av burturkastinum sum gjørligt. Tað, sum ikki kann endurnýtast ella endurvinnast, eigur at verða burturbeint á ein umhvørvisliga skilagóðan hátt. Tað, sum kann brennast, eigur at verða brent soleiðis, at sum mest fæst burtur úr orkuni. Aftrat hesum er av stórum týdningi at minka um nøgdirnar av vandamiklum evnum í burturkastinum.**

”Nýt og blaka burtur mentanin”, sum eyðkennir nútíðar brúkarasamfelagið, er bygd á ta fatan, at tilfeingið er ótømandi. Hetta hevur m.a. ført við sær, at nøgdirnar av burturkasti eru alsamt vaksandi.

Úrslitið av hesum er dálking av jørð, vatni og luft, skaðar á djór og menniskjur vegna spjaðing av eiturevnum, vánalig nýtsla av tilfeinginum, dálking av náttúruni og stórar samfelagsligar útreiðslur til flutning og viðgerð av burturkasti.

Føroyar eiga at taka avbjóðingarnar á burturkastøkinum í fullum álvara og leggja seg eftir at:

- Minka um burturkastnøgdirnar.
- Fremja endurnýtslu og endurvinning.
- Økja um góðskuna í viðgerðini av burturkasti, m.a. við at minka um nøgdirnar av vandamiklum evnum í burturkastinum.
- Betra um nýtsluna av orku frá brenning.

Til tess at ganga hesum málum á møti eru fleiri ymisk øki, sum neyðugt er at arbeiða við.

Aðalmálið á burturkastøkinum er sum nevnt at minka um nøgdirnar av burturkasti, og her er ein miðvís planlegging fram ímóti málinum týdningarmesta amboðið. Myndugleikar, framleiðarar og brúkarar eiga í felag at leggja eina ætlan fyri, hvussu burturkastnøgdirnar kunnu minka

Eitt annað øki við stórum avbjóðingum er nýtsla av reinari tøkni. Framleiðsluhættir og vørur, herímillum eisini pakkitilfar, eigur at vera soleiðis háttað, at so lítið tilfeingi sum gjørligt verður nýtt. Bæði undir framleiðslu, nýtslu, og tá vøran er vorðin til burturkast. Eisini er av stórum týdningi at minka um innihaldið av umhvørvisfremmandum evnum í framleiddu vørunum.

Her eiga framleiðarar at taka sína ábyrgd og leggja seg eftir at nýta so reina tøkni sum gjørligt. Besta loysnin er at innføra umhvørvisstýring á virkini – bæði stór og smá.

Myndugleikarnir eiga, við ymiskum amboðum, at stuðla uppundir, at reinastu framleiðsluhættir verða nýttir, og at virki nýta umhvørvisstýring.

Eisini er umráðandi at skilja burturkastið. Tað er av stórum týdningi at nýta tilfeingið, sum er í burturkastinum. Neyðugt er tí at skilja burturkastið í fleiri bólkar, sum síðani verða viðgjørdir fyri seg, um hetta loysir seg umhvørvisliga og fíggjarliga. Á henda hátt kann endurnýtslan økjast og størstu trupulleikarnir við umhvørvisskaðandi evnum loysast.

Í Føroyum er skiljing av burturkasti enn eitt nýtt fyribrigdi, hóast gongd er við at koma á. Tað eru kommunurnar, sum hava dagligu ábyrgdina av handfaringini og viðgerðini av burturkastinum.

**Yvirskipað mál fyri burturkastøkið:**

- Minka um burturkastnøgdirnar.
- Fremja endurnýtslu.
- Minka um nøgdina av vandamiklum evnum í burturkastinum.
- Betra um nýtsluna av orku frá brenning.
- Reinari tøkni.

**Málsetningar**:

- Avgjøld á serliga dálkandi og tilfeingiskrevjandi burturkast / vørur.
- Umhvørvisstýring á virkjum.
- Minka um pakkitilfar.

# Kapittul 6

## *Almen luttøka og Lokal Agenda 21*

**Sum nevnt í Agenda 21 skjalinum frá 1992, kann ein burðardygg menning í 21. øld einans gerast veruleiki, um allir partar av samfelagnum luttaka. Ein breið almenn luttøka, tá ið avgerðir skulu takast, er ein grundleggjandi fyritreyt fyri burðardyggari menning, og er hetta treytað av, at borgarar sleppa framat upplýsingum um umhvørvið. Arbeiðið við Lokal Agenda 21 hevur ein serstakan leiklut í hesum samanhangi, serliga grundað á tað tætta samstarvið við fólk á staðnum.**

Í 1998 samdust norðurlendsku forsætisráðharrarnir og leiðararnir fyri teimum sjálvstýrandi økjunum Føroyar, Grønland og Áland í *Deklarationen om et bæredygtigt Norden* um, at eitt burðardygt samfelag má byggja á demokrati, opinleika og luttøku í lokalum, regionalum og altjóða arbeiði.

Opinleiki og luttøka hanga saman, og royndir vísa, at opinleiki um umhvørvismál er ein fyritreyt fyri eini umhvørvistilvitaðari almannahugsan. Tað var tí eitt týdningarmikið fet á leiðini, tá ið sokallaða Århus-konventiónin í 1998 varð undirskrivað.

Århus-konventiónin gevur m.a. borgarum rætt til størri skjalainnlit og tryggleika fyri at neyðugu umhvørvisupplýsingarnir eru tøkir. Harafturat leggur konventiónin dent á, at privatar fyritøkur eiga at upplýsa um, hvussu teirra virksemi ávirkar umhvørvið.

Í januar 2000 høvdu 40 evropeisk lond undirskrivað Århuskonventiónina. Føroyar eiga eisini at taka undir við Århuskonventiónini og soleiðis stimbra undir eina umhvørvistilvitaða almannahugsan.

Ein stórur partur av Agenda 21 skjalinum snýr seg um at styrkja um møguleikan hjá størru bólkunum í samfelagnum at taka lut í arbeiðinum við burðardyggari menning. Hesir bólkar eru m.a. vinnulív, sjálvbodnir felagsskapir, kommunur, fakfeløg og børn og ung.

Loysnirnar til nógvu trupulleikunum rundan um burðardygga menning eru at finna í lokalum virksemi. Kommunurnar hava tí ein serstakan leiklut. Arbeiðið við Lokal Agenda 21 fevnir partvíst um virksemi innanfyri kommunala økið og partvíst um virksemi á lokalu økjunum, sum verða rikin av virkjum, feløgum ella einstaklingum.

Tankin er, at lokalu myndugleikarnir í samstarvi við íbúgvarnar, vinnulívið og feløg kunnu koma ásamt um teir trupulleikar og umstøður, ið eyðkenna økið, og soleiðis leggja eina ætlan fyri burðardygga menning í kommununi.

Nógvar kommunur, serliga í Norðurevropa, hava sett sjøtul á arbeiðið við Lokal Agenda 21. Í Føroyum er hetta arbeiðið ikki rættiliga byrjað enn, men tað er av stórum týdningi at fáa gongd á. Ætlanin er, at land og kommunur seta á stovn skrivstovu, sum skal veita kommununum vegleiðing og íblástur í Lokal Agenda 21 arbeiðinum.

Ein avbjóðing liggur eisini í at fáa lokala vinnulívið at taka lut í arbeiðinum, og at fyritøkurnar kunna hvørja aðra um sínar royndir. Eitt styrkt samstarv millum tað almenna og vinnulívið á hesum øki kann eisini verða til stórt gagn.

**Yvirskipað mál fyri almenna luttøku og Lokal Agenda 21**

- Føroyar eiga at taka undir við grundreglunum í Århuskonventiónini um atgongd til upplýsingar, almenna luttøku í avgerðum og atgongd til at kæra um avgerðir á umhvørvisøkinum.

- Styrkja og breiða út arbeiðið við Lokal Agenda 21 í kommununum

**Málsetningar**:

- Skrivstova skal stovnast at veita stuðul í Lokal Agenda 21 arbeiðnum.

- Umhvørvissamstarvið ímillum tað almenna og vinnulívið eigur at styrkjast.

- Luttøkan hjá borgarum og sjálvbodnum felagsskapum í arbeiðnum fyri burðadygga menning eigur at styrkjast.

- Bæði almenna og privata innliti og opinleikin innan umhvørvismál má økjast.

# Kapittul 7

## *Uppfylging*

Hetta er eitt uppskot um eina føroyska ætlan fyri burðardygga menning. Næsta stigið í arbeiðinum liggur í at gera málsetningarnar meira ítøkiligar. Tilgongdin at gera yvirskipaðu málsetningarnar ítøkiligar er av stórum týdningi. Ein føroysk ætlan fyri burðardygga menning er eisini ein ætlan fyri framtíðina hjá Føroyum og føroyingum. Tað er tí av størsta týdningi at fáa so nógvar bólkar í samfelagnum at geva íkast og viðmerkingar sum gjørligt – júst sum Agenda 21 mælir til.

Ein millumstýrisbólkur eigur at verða settur við umboðum úr øllum stýrunum, hvørs høvuðsuppgáva verður at gera ætlanina ítøkiliga. Hetta skal gerast m.a. við at seta áramál á, velja stýringarskipanir, greina ábyrgdarbýti og fígging. Hesin bólkur skal gera av, hvussu stýrini á teirra avvarðandi økjum fáa umhvørvisfyrilit við í teirra dagliga virksemi. Harafturat skal bólkurin skipa fyri hoyringum og annars á annan hátt gera ætlanina almenna og viðkomandi fyri so nógvar samfelagsbólkar sum gjørligt. Børn og ung eru í hesum sambandi ein bólkur av serligum týdningi.

Eftir at fyrsta uppskotið av ætlanini er liðugt, kann bólkurin møguliga víðkast til eisini at hava umboð frá kommunum, vinnulívi og øðrum bólkum, eitt nú ymiskum sjálvbodnum felagsskapum.

Indikatorar sum lýsa burðardyggu menningina eiga at mennast. Teir eru eitt týdningarmikið amboð til tess at fylgja við íverksetingini av ætlanini og skulu nýtast sum grundarlag fyri uppfylgingini.

Tann endaliga ætlanin eigur við jøvnum millumbilum at eftirmetast og tillagast broyttum umstøðum. M.a. kann talan verða um at taka nýggj øki uppí ella at taka burturúr.